# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2018/19



## SPURDÓMUR: HVÍ HAVA VIT JÓLATRÆ



Granskarar: bólkur 2 í Sands skúla

Kristoffur, Brandur, Herman, Arnbjørn, Jákup Andrias, Hjalti, Kristina, Elly, Elisabet, Olivur, Elsi, Elsebeth, Vár, Hannah og Armgarð

# INNGANGUR

Vit hava roynt at funnið so nógv sum gjørligt um jólatræið.

Vit hava spurt eldri fólk, hvussu tey minnast jólatræið, tá tey vóru børn. Vit fingu nógv at vita frá teimum.

Vit hava eisini kanna, hvussu er nú á døgum.

Vit hava leita á netinum og funnið okkurt spennandi.


Lærari: Lilian Clementsen og Kristian Højsted

lilian.clementsen@skulin.fo

Luttakarar:

Arnbjørn og Elisabet úr 1. flokki

Herman, Hjalti, Kristina og Elly úr 2.flokki

Kristoffur og Armgarð úr 3.flokki

Olivur, Elsebeth og Hannah úr 4.flokki

Brandur, Jákup Andrias, Elsi og Vár úr 5.flokki

Øll í Sands skúla



Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

3. Legg eina ætlan

4. Savna upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sig øðrum frá

Fylgiskjøl

1. Vit velja spurdóm
2. Spurningar til bygdafólki
3. Vitjan á Ellisheimi
4. Jólatræið

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Vit undrast á, hví vit munnu hava jólatræ.



# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Vit halda at vit hava jólatræ:

So vit kunnu pynta tað og eisini dansa rint um tað.

Vit kunnu brúka tað til brenni.

Tí jólatrø eru grøn um veturin og veksa um veturin.

# 3. LEGG EINA ÆTLAN

Vit gjørdu av at gera spurnarbløð.

Vit ætlaðu at spyrja fólk á ellisheiminum Áargarði.

Eisini ætlaðu vit at spyrja børn í skúlanum.

Vit ætlaðu eisini at spyrja fólk úti í bygdini.

Og lærararnir skuldu eisini svara okkara spurningum.

# 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

Vit hava verið á ellisheiminum Áargarði, og vit funnu fram til, at nøkur har hava havt jólatræ heima, og nøkur hava havt felags jólatræ í skúlanum.

Ein bólkur hevur verið og spurt eldri fólk í bygdini, og tey søgdu, at tey brúktu urtapottar, til at halda jólatrænum uppi við.

Vit hava eisini gjørt eina spurnarkanning millum skúlabørnini, um hvat slag av jólatrøum tey brúktu, og um tey dansaðu um jólatræið, og nær tey byrja at pynta jólatræið heima.

Nøkur hava gjørt pynt til plakatina, og nøkur hava skrivað søguna um jólatræið, og um hví tað eitur jól.

Ein bólkur leitaði á internetinum eftir myndum og øðrum upplýsningum um jólatræið.






# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Í gomlum døgum brúktu tey urtapottar sum jólatræ, tað var, tí tey áttu ikki so nógvar pengar, og tey pyntaðu við livandi ljósi og einglahári og vatttottum.

Fyrsta jólatræið sást í Týsklandi um ár 1600, og so í Danmark og so í allari verðini, og nógv fólk dansaðu runt um jólatræið.

Vit gjørdu eina kanning í skúlanum. 21% søgdu, tey høvdu falskt(plast) jólatræ. 25% søgdu, tey høvdu vanligt jólatræ.




Ein spurningur var, nær tey pyntaðu jólatræið. 11% pyntaðu tíðliga í desember. 23% pyntaðu beint undan jólaaftan. 14% pyntaðu mitt í desember.



Ein spurningur var, um tey dansaðu um jólatræið. 19% svaraðu ja og 21% svaraðu nei.



# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Vit fara at gera eina plakat og vísa fram fyri foreldrum og familju.

(framløgur á foreldratiltaki)






# FYLGISKJØL

1.

Spurningar, sum øll børnini í skúlanum lótu inn í spurnarpostkassan, áðrenn arbeiðsdagarnir byrjaðu:

Vit valdu ein spurning og arbeiddu við honum í tveir skúladagar.



1 Hví hava vit jólatræ ?
2 Hví pyntar man jólatræ ?
3 Hví fáa vit jólagávur ?
4 Hví hongja vit hosu ?
5 Hví hava vit jólakalendara ?
6 Hví eitur tað jól ?
~~7 Hví var Maria vald at verða mamma at Jes~~
~~8 Nær og hví kom jólamaðurin ?~~
9 Hví er alt reytt á jólum ?
10 Hví kom stjørnan á himmalin ?
11 Er tað altíð kavi á jólum ?
12 Hví eta vit rísingreyt á jólum ?
13 Hvat er vanligasti jóladøgurðin ?
~~14 Hvar býr jólamaðurin ?~~

2.

# Spurningar til fólk

Vit hava veri úti og spurt spurningar um jólatrø, t.d. hvar fingu tit jólatrø frá?

hvat pynt brúktu tit? Hvørji ljós høvdu tit á?

Vit fingu nógv svar.

Nøkur fólk brúktu urtapottar, tí man ikki hevði jólatrø á Sandi fyrr.

Vit fingu at vita, at fyrr brúktu tey livandi ljós á trænun ella urtapottinum.

Og tey brúktu eingla hár á jólatrænum. Og tey pyntaðu altíð jólatræ 24

desembur. Og øll høvdu stjørnu á topinum á jólatrænum.

Skriva hava Vár, Elsi ,Elsebeth, Hannah og Armgarð

3.

# VITJAN Á ELLISHEIMINUM

Vit fóru á ellisheimið at spyra tey gomlu. Vit spurdu, nær byrjaðu tit pynta jólatræ, tey spurdu 4 fólk. vit fóru í skúla.

Ein segið at tey pyntaðu træið við vatttottum so tað líktist kava.

Øll søgdu at livandi ljós vóru á trænum.

Onkur høvdu træ heima og hini høvdu træ í skúlanum.

Mamman pyntaði træið við nissum og kurvum.

Tey dansaðu um træið.

Tá fólk fingu meira pengar komu jólatrø í hvørt hús.

4.

# Jólatræ



Tað fyrsta jólatræið  kom í 1600 og tað var í Týsklandi

Tað fyrsta jólatræið í Danmark var tíðliga í 19.øld. Seint í 19.øld hevði siðurin at hava jólatræ fingði fótafesti í øllum samfelagsløgum í Danmark. Siðurin at hava jóltræ tók  seg  upp í Føroyum um aldarskiftið  1800-1900 ella fyri stívltiga hundrað árum síðani. Fyrsta jólatræið stóð í prestagarðinum í Sandágerði.  Sambært handilslýsingum í Dimmalætting frá desember 1912- ella fyri júst 112 árum síðani-kostaðu jólatrøini tá á døgum 35 oyru hvørt.